2´arin

Les í morgin

Fyrsta violinin kostaði 9 rublar

Nicolaos Kapnas er komin úr sovjettiska lýðveldinum Usbekistan, umvegis Grikkaland og Belgia, til Føroya. Hann hevur spælt violin, síðani hann var 9 ára gamal, og nú er hann musikklærari í Føroyum. Les søguna um mannin, sum hevur tikið ferðina úr tí kommunistiska Sovjettsamveldinum til frælsa vestureuropa

Toleransa er boðskapurin

»William Heinesen hevði ikki verið William Heinesen, um hann skrivaði á føroyskum. Ein stórur partur av spenninginum í málinum stavar nettupp frá, at William er føroyingur, sum skrivar um Føroyar á donskum,« skrivar Jógvan Isaksen millum annað á 100 ára degnum hjá mæta rithøvundinum

og mangt annað

Helgi Larsen hevur uppfunnið framkomnu trollemmarnar, sum eru gjørdir við flogtøkni sum fyrimynd
Mynd: John Johannessen

Norskt felag selja trollemmarnar úr Vági

Norska SM-Gruppen skal umboða føroysku Injector Door trollemmarnar á norska og á russiska marknaðinum - og seinni eisini í New Zealandi. Arbneitt verður eisini við eini licensavtalu um framleiðslu

Í seinasta innanhýsis blaðnum hjá norsku SM-Gruppen stóð, at eitt felag í bólkinum, ið kallast SM Triplex, er við at gera avtalu við Injector Door um umboðan av trollemmum teirra. Blaðið vísir á góðu úrslitini frá royndum við trollemmunum, bæði á Det Danske Institut for Fiskeriteknologi og á trolroyndir hjá føroyskum, donskum og norskum skipum.

SM Gruppen væntar sær nógv av russiska marknaðinum, og í løtuni verður arbeitt uppá at koma inn á marknaðin á amerikansku vesturstrondini og Alaska. Síðani stendur New Zealand fyri tørni.

Umframt avtaluna um umboðan av trollemmunum úr Vági arbeiða SM Gruppen og Injector Door eisini við ætlanum um licensframleiðslu av lemmunum til suður- og miðamerikanska marknaðin.

Norska SM-Gruppen hevur fyri stuttum keypt virkið Datronik, ið føroyingurin Arnbjørn Durhuus eigur. Felagið Datronik, ið m. a. er kent fyri undirvatnsmyndatól til aliringar, virkaði fyrr í Føroyum, men flutti til noregs undir kreppuni.

Laksaútflutningurin tvífaldaður

Góði laksaprísurin seinastu mánaðirnar hevur merkt, at útflutninigurin í 1999 var væl størri enn væntа. Hetta kemur hinvegin at ávirka forsøgnirnar fyri útflutningin í ár.

Alarar hava seinastu mánaðirnar tikið allan tann fiskin, ið var búgvin at slakta, fyri at njóta gott av góða prísinum. Seinastu tølini vísa, at samlaði útflutningurin í 1999 kom upp á 34.416 tons av laksi og sílum í kruvdari vekt, sum svarar til uml. 41.000 tons í rundari vekt, móti 20.362 tons í 1998.

Meðaprísurin 23,5 kr

Enn eru ikki neyvar útrokningar gjørdar av meðalprísinum, men mett verður at hann hevur ligið um 23, 50 pr. kg. Hetta merkir, at útflutningsvirði í 1999 av alda fiskinum var uml. 950 mió. kr í mun til 430 mió. í 1998. Fyrr í ár var mett, at útflutningurin í 1999 fór at liggja um 35.000 tons í rundari vekt, og at útflutningurin fór at økjast til 48.000 túsund tons í ár 2000. Stóra og framskundaða tøkan í 1999 merkir, at útflutningurin í ár verður á sama støði.

Slíkar forskjótningar við marknaðarprísinum eru ikki óvanligar. Í 1998 hendi júst tað øvuta. Vegna vánaligan prís seinast á árinum, var slagt útsett til fyrra part av 1999. Útflutningurin í 98 var tí bert 20.362 tons í rundari vekt, meðan hann var 22.205 tons í 1997, skrivar Vinnuhúsið í tíðindaskrivi.

Bíðilistar leingjast munandi

Á intensivu deild er bíðitíðin longu upp ímóti hálvum ári. Tað slepst ikki undan, at sparingarnar, sum ætlanin nú er at fremja á Landssjúkrahúsinum, fara at raka sjúklingarnar meint, sigur Helena Dahl Olsen, deildarsjúkrasystir

ÁKI BERTHOLDSEN

– Verða fleiri sparingar framdar á Landssjúkrahúsinum, ja ..... so er onki eftir.

Helena Dahl Olesen, deildarssjúkrasystir á B6 á Landssjúkrahúsinum dylir ikki fyri, at hon er skelkað av, at spariknívurin enn einaferð er settur á Landssjúkrahúsið.

Tað var á leiðslufundi mikudagin, at sjúkrahúsleiðarin, Jákup Mørkøre, kunngjørdi, at tað verður neyðugt at spara góðar tríggjar milliónir í ár fyri at halda játtanina.

Tað merkir, at 20-27 fólk skulu sigast upp í næstum, alt eftir, hvussu harðliga farast skal fram.

Og sum ikki einaferð verður tað aftur nú røktarøkið, sum verður harðast rakt av sparingunum.

Tí upp til 12 sjúkrasystrar skulu sigast úr starvi, alt eftir, hvussu langa uppsagnartíð, tær hava.

Tær flestu hava seks mánaða uppsøgn.

Ætlanin var, at uppsagnirnar skulu sendast teimum í hesi vikuni.

Nógv longri bíðilistar

Eftir, hvat skilst, er ætlanin hjá ovastu leiðsluni ikki, at virksemið á Landssjúkrahúsinum skal minkast, hóast upp til 12 sjúkrasystar verða sagdar úr starvi.

Tí ætlanin hjá leiðsluni er nevniliga ikki, at talið á innleggingum skal lækka, hóast deildirnar nú fara at verða verri mannaðar, enn tær hava verið.

–Men tað er heilt ómøguligt, staðfestir deildarsjúkrasystirin á B 6 beinanvegin.

–Vit hava spart hvørt einasta ár øll kreppuárini.

– Men samstundis er talið á innleggingum og viðgerðum munandi hækkað

– Og tað sigur seg sjálvt, at fyrr ella seinni koma vit til eitt mark, har tað ikki ber til at spara meiri.

– Og tað markið er longu rokkið.

Helena Dahl Olesen sigur, at tað svitast ikki, at tær sparingarnar, sum ætlanin nú er at seta í verk, fara at føra til, at færri fólk verða løgd inn á landssjúkrahúsið.

Tá ið manningartalið aftur nú skal minkast, ber heilt einfalt ikki til at taka ímóti líka nógvum sjúklingum, sum vit hava gjørt, sigur hon.

– Og tað merkir so aftur, at bílilistarnir til tær ymsu viðgerðirnar fara verða longri framyvir, enn teir longu eru.

Sum eitt dømi vísir deildarsjúkrasystrini á, at á medisinsku deild vóru 4.412 fólk innløgd í 1998.

Í 1999 var talið uppi á 4.582 fólkum, sum vórðu innløgd á medisinsku deild.

Men hesa seinastu tíðina hava tey ásannað, at tað er ov nógv við teirri manning tey hava, so tey hava roynt at skorið tað niður, tí hvørja ferð eitt fólk verður innlagt, er tað ein heilt ávís mannagongd, sum skal fylgjast.

Og tað er eitt mark fyri, hvussu nógv fólk tað yvirhøvur ber til at leggja inn.

Og við teimum sparingunum, sum ætlanin nú er at seta í verk, ivast hon ikki í, at talið á innleggingum munandi niður.

Sostatt fara bíðilistarnir at leingjast munandi, leggur hon afturat.

Men hvørjar innleggingarnar vera, eru sjálvandi altíð í samráð læknarnar.

Long bíðitíð á intensivu deild.

Hon vísir á, at sjálvt á intensivu deild er langur bíðilisti.

– Har eru tey longu nú farin at skriva sjúklingar upp til kanningar, innleggingar og viðgerð í juni mánaða, so hara er talan um eina bíðitíð uppá 5 til 5 1/2 mánaða.

Og tað sigur seg sjálvt, at hóast allir sjúklingar, sum hava bráðfeingis hjálp fyri neyðini, sjálvandi verða innlagdir, er tað sera óheppið, at tað er so long bíðitíð á eini intensivari deild.

Hon vísir eisini á, at fleiri deildir hava longu brúkt meiri pening hini árini, enn tey hava fingið játtað, so at tær koma allar í tað nýggja árið við skuld, sum eisini skal avgreiðast.

–Men hetta er bara ein tekin um, at vit hava mangla fólk hini árini, og at vit hava verið noydd at boðsent fólki, sum annars hava havt frí, til arbeiðis.

– Og so at skerja uppaftur meiri í ár, ber slett ikki til, uttan at tað fær avleiðingar.

Sparingar hava fært við sær, at sjálvt á intensivu deild eru langir bíðilistar. Og sparingarnar, sum nú verða settar í verk, fara at føra til enn longri bíðilistar til ymsar kanningar og innleggingar, tí tað fer ikki at bera til at hava líka nógvar innleggingar við skerdari manning

Dygdin ikki nóg góð

Helena Dahl Olesen sigur, at allar tær mongu sparingarnar raka eisini sjúklingarnar á tann hátt, at dygdin í viðgerðini er ikki nóg góð.

– Longu sum er, mugu vit ásanna, at dygdin er ikki tann besta.

– Vit hava ikki nóg góðar stundir til hvønn sjúkling. Ikki minst merkist hetta á tíðini, sum vit hava til at upplýsa sjúklingin um sjúkustøðuna, um viðgerðina, um, hvussu hann sjálvur skal bera seg at og annars um alt tað, sum tað er neyðugt at práta við hann um.

– Tað hava vit ov lítla tíð til, sum er, og tað er eitt afturstig fyri viðgerðina.

Deildarsjúkrasystirin leggur afturat, at hon torir at siga, at hetta gevur eisini bakslátur á tann hátt, at fólk verða innløgd aftur av tí at tey ikki hava fingið so góða viðgerð og upplýsingar sum tey áttu, fólk, sum annars ikki høvdu verið innløgd, um alt var, sum tað átti.

Hýrurin ringur

Helena Dahl Olesen segði okkum í gjáramorgunin, at hýrurin á Landssjúkrahúsinum er í botni.

Men hon helt, at tey høvdu enn ikki fatað, tað sum var hent og at reaktiónin var ikki komin enn.

Og tey trúðu enn onki uppá, at hetta verður veruleiki.

Men nú verður so bara bíða eftir, hvat fer at henda.

20-27 sigast úr starvi

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur nú lagt sína árligu spariætlan fram

ÁKI BERTHOLDSEN

Ímillum 20 og 27 fólk skulu sigast nú upp á Landssjúkrahúsinum.

Hetta er avleiðingin av teimum sparingum, sum leiðslan á Landssjúkrahúsinum ætlar at seta í verk í ár fyri at kunna halda játtanina á fíggjarlógini.

Løgtingið hevur í ár játtað Landssjúkrahúsinum 193.863 milliónir til lønir.

Men skuldi tað havt fingið nóg mikið til lønarhækkingarnar uppá 6,35%, og til útreiðslurnar uppá 1,6 millión til tað nýggju leiðsluna í sambandi við bygnaðarbroytingarnar, skuldi játtanin verið 3.248 milliónir hægri.

Men afturat hesum koma upphæddirnar, sum ymsar deildir hava brúkt ov nógv árini frammanundan og sum skal vinnast innaftur. Sostatt verður neyðugt at siga onkustaðni ímillum 20 og 27 fólkum úr starvi, alt eftir, hvussu harðliga fram verður farið var boðskapurin frá Jákup Mørkøre, sjúkrahúsleiðara, á leiðslufundinum mikudagin.

Ikki minst verður røktarøkið hart rakt av sparingunum, tí upp til 12 sjúkrasystrar skulu sigast úr starvi.

Harafturat skulu eitt ella tvey fólk sigast upp á laboratoriunum, umframt trý fólk, sum koyra sjúkrabilin í Eysturoynni. Samstundis er ætlanin at privatisera sjúkraflutningstænastuna í Eysturoyvvi.

Eisini er ætlanin at siga tveimum fólkum upp á snikkaraverkstaðnum og fýra fólkum á maskinverkstaðnum.

Men harafturat er ætlanin at leggja vekslaran, húsavørðarnar og sjúkraflutningstænastuna saman.

Sum er, sita tvey fólk hurð um hurð og taka telefon um næturnar og hildið verður, at tað er nógv mikið við einum fólki. Men um dagin skal ein portørur hjálpa til og samskipa tænasturnar hjá portørunum.

Samstundis skal fólkið í vekslaranum á skeið at læra seg at taka ímóti samrøðum um bráðfeingis sjúkraflutning. Somuleiðis er ætlanin at samskipa portørarnar og húsavørðarnar, tí í báðum førum er talan um flutning og goymsluvirksemi.

Við hesum broytingum er mett, at fýra størv kunnu sparast. Fyri ein part verður tó talan um nátúrliga frágongd.

Jógvan Jensen, leiðari á sjúkraflutningstænastuni, heldur, at umskipingarnar hjá portørunum, húsavørðunum og sjúkraflutningstænastuni í Eysturoynni eru fult út forsvarligar.

– Tað er ongin orsøki til, at tvey fólk ansa telefonini um náttina, tí tað er leingi ímillum, at hin ringir. Og at privatisera sjúkraflutningin í Eysturoy, er roynt fyrr í Vágum og í Sandoynni, har teir, sum koyra sjúkrabil, fáa løn fyri hvønn túr og ikki fasta løn. Tað er ein skipan, sum virkar avbera væl. Og hann dugir heldur ikki at síggja meiningina í, at bæði portørar og húsavørðar skulu koyra so nógv runt við og eftir varu.

– Við eini felags leiðslu hevði borið til at samskipa flutningin, so at hann bleiv nógv effektivari, sigur hann.

Álitisfólk mótmæla

Álitisfólkini á Landssjúkrahúsinum mótmæla harðliga uppsagnunum

JOHN JOHANNESSEN

Álititsfólkini á Landssjúkrahúsinum mótmæla í yvirlýsing hósdagin harðliga teimum 27 uppsagnunum, sum tey siga vera álagdar frá Almanna- og Heilsumálastýrinum.

Álitisfólkini góðtaka ikki, at uppsagnirnar verða framdar, uttan at starvsfólkini verða tikin upp á ráð, og krevja tey, at um meira skal sparast í heilsuverkinum, so mugu politikararnir siga, hvørjar funktiónir skulu burtur.

Afturat hesum krevja álitisfólkini, at ein endamálsorðing verður gjørd fyri sjúkrahúsverkið. Hendan endamálsorðing skal staðfesta, hvat vit vilja við heilsuverkinum, hvørjir sjúklingar skulu viðgerðast og hvørjar funktiónir skulu skerast burtur.

– Játtanin til Landssjúkrahúsið er enn ikki komin upp á tað støðið, sum hon var í 1992. Síðani tá eru fleiri nýggjar funktiónir álagdar Landssjúkrahúsinum uttan, at peningajáttan er fylgd við, siga álitisfólkini.